Vikuskiftis Sosialurin


# Poul Schlüter til Føroya

**Sunnudagin kemur fyrrverandi statsministarin, Poul Schlüter, til landið. Hann skal hava eitt innlegg á eini ráðstevnu, sum løgmansskrivstovan skipar fyri mánadagin**

VITJAN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Poul Schlüter verður ein av talarunum á rástevnuni, sum løgmansskrivstovan skipar fyri komandi mánadag.*
*mynd: www.tinganes.fo*

Ráðstevnan, sum Poul Schlüter skal luttaka á, verður í Norðurlandahúsinum mánadagin og fer at snúgva seg um samspælið ímillum politikk og fyrisiting.

Poul Schlüter byrjar dagin við at greiða frá um sínar royndir sum statsministari. Hann fer eisini at tosa um tamil-málið, sum var tað stóra málið, sum feldi hann. Hann fer eisini at svara spurningum úr salinum.

Næstur á skránni verður Finnbogi Ísakson, sum fer at tosa um politikk fyrr og nú. Hann hevur verið virkin í politikki í tveimum ymiskum tíðarskeiðum, umframt at hann sat sum tingformaður í eini tíð, har nógvar broytingar fóru fram.

Eftir hann kemur Jákup Vestergaard, sum bæði hevur verið virkin í lands– og kommunalpolitikki. Hann fer serliga at greiða frá samspælinum ímillum politikk og fyrisiting frá einum kommunalpolitiskum sjónarhorni, umframt frá sínum royndum sum landsstýrismaður.

Seinasti røðarin undan steðginum verður Marjun Hanusardóttir, sum er stjóri á løgmansskrivstovuni. Hon fer at lýsa sjónarhornið hjá embætisfólki, og fer at tosa um vánirnar, sum embætisfólk hava til politikarar.

**Eftir steðgin**

Annita á Fríðriksmørk hevur seinasta innleggið. Hon fer at tosa um hvar snávingarsteinarnir eru í politikki. Fólk fara uppí politikk við ambitiónum og visiónum, men tað gongur ofta nógv seinni enn væntað at fáa nakað ígjøgnum. Hon fer at tosa út frá egnum royndum, bæði sum tinglimur og landsstýriskvinna.

Seinast á skránni verður ein pallborðsfundur. Herálvur Joensen, Gunnleyg Durhuus, Leif Abrahamsen og Súsanna Danielsen fara at luttaka. Tey fara at geva síni boð uppá nútímans fyrisiting, umframt at hugleiða um innleggini, sum hava verið fyrr um dagin.

Løgmaður endar við at draga samanum, og greiða frá politikkinum hjá sitandi landsstýri.

Ráðstevnan er ætlað fólki, ið arbeiða við politikarum, polikarum og annars fólk, sum hava áhuga at hoyra um evnið. Higartil hava 150 fólk teknað seg.

Kona Poul Schlüter, Anne Marie Vessel, kemur við honum til Føroya, og tey bæði fara niður aftur týsmorgunin.

# Hvat skógvarnir siga um konufólk

**Ein nýggj kanning ger tað møguligt at læra sera nógv um konufólk, bert við at hyggja at skónum, tær eru í**

Amerikumenn hava nú gjørt eina nýggja kanning av konufólki og skóm teirra.

Meghan Cleary frá New York hevur givið út eina bók, sum eitur » Tú kanst læra nógv um eina kvinnu við at hyggja at skóm hennara – álvara!«

Bókin snýr seg um, hvussu tú kanst síggja persónligheitina á kvinnum, við at hyggja at hvørjum skóm tær ganga í. Tað sigur nevniliga rættiliga nógv, verður staðfest.



Kanningin vísir, at konufólk, ið brúka sonevndar flip-flops ella klipp-klappar, ið eru eitt slag av inniskóm, eru uttandura typur, sum eru fullar av orku og sum elska havið.

Konufólk, ið ganga í tuflum eru búnar, arbeiðssamar og vinarligar kvinnur.

Teimum, ið best dáma ítróttarskógvar og sneakers, eru modernaðar, vita alt um nýggjasta tónleikin og dáma væl at vera í býnum, dag sum nátt.

Tær kvinnur, ið nýta høghælaðar sandalur, eru ógvuliga femininar. Tær megna væl at fáa øll øki í lívinum at javnviga, bæði kærleikslívið, arbeiðslívið og sosiala lívið.

Høvundurin av bókini, Meghan Cleary, hevur gjørt kanningina og skrivað bókina út frá egnum eygleiðingum, og hon er nú sannførd um, at einki sligur so nógv um sinnisstøðuna hjá eini kvinnu, sum skógvarnir.

Um tað veruliga passar kunnu fólk so sjálvi meta um. Men um tit eru vorðin bitin av háttinum, kunnu tit gleða tykkum, høvundurin er nevniliga longu farin undir eina tílíka guide til mannfólk og skógvar teirra eisini.

**eys**

# Atlantsflog fingið risaordra í Noregi

**Nýggi sáttmálin við Aker Stord hevur virði av sløkum 100 mió. krónum og er galdandi í tvey ár**

FLOGFERÐSLA
*Snorri Brend*

**Sáttmáli:** Føroyska flogfelagið Atlantic Airways skrivaði fríggjamorgunin undir nýggjan sáttmála við Aker Stord.

Hesin sáttmálin er um flutning av arbeiðsfólki til og frá Molde, har Aker Stord stendur fyri byggingini av einum stórum gassframleiðsluverki fyri Norsk Hydro. Verkætlanin kallast Ormen Lange.

Sáttmálin verður mettur til at hava eitt virði millum 60 og 100 mill. krónur.

Tað er á leið tað sama sum sáttmálin um flúgving fyri Aker Stord til Snøhvidt verkætlanina í Norðurnoregi.

Flúgvingin til Molde tekur seg upp í august í ár, og mennist rættiliga á várið 2006 og heldur síðani fram móti ársenda í 2007.

- Hetta skapar grundarlag fyri fjórða flogfarinum í flotanum. Tí fær eitt flogfar við manning helst støð í Stavanger tíðliga í heyst, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.

# Ongin vandi í Keypmannahavn

Leiguflogfarið, sum fór úr Bruxelles í hóskvøldið til Føroya, valdi at seta seg í Keypmannahavn, tí skiparin fekk ein indikator uppá brek á hydraulik-skipanini, verður sagt frá Atlantsflogi. Flogskiparin valdi at fara til Keypmannahavn, tí har vóru umstøðurnar bestar at lenda og at fáa brekið umvælt.

Vanliga verður roknað við, at flogfarinum tørvar longri breyt at steðga á, um brek er á hydraulik-skipanini, og Atlantsflog hevur viðlíkahaldsstøð í Keypmannahavn. Talan var sostatt um at taka fyrilit fyri trygdini, og ikki um nakra vandastøðu.

Ferðafólkini gistu á hotelli í nátt og brekið, sum vísti seg at vera ein brostin slanga, var umvælt. Ferðafólkini komu heim ígjár.

## Datt seks metrar úr stiga

Enn eitt arbeiðsóhapp hendi hóskvøldið, tá ein maður var áhaldsin og datt seks metrar úr einum stiga inni á Hjalla

Í hesum døgum er nógv virksemi inni á Sandvíkarhjalla, har ein stór fiskivinnumessa skal haldast í komandi viku.

Tað var undir hesum arbeiðnum, at óhappið hendi. Av løgreglustøðini frætta vit, at ein maður datt úr einum stiga, og at fallið var einar seks metrar. Maðurin varð alt fyri eitt fluttur á sjúkrahúsið.

Sagt verður, at støðan hjá manninum er støðug. Arbeiðseftirlitið kannar nú tilburðin.

**eys**

## Eina viku ov tíðliga

Tiltakið hjá Vága Ríðingafelag á Giljanesi verður hildið næsta vikuskifti

Í fríggjadagsblaðnum var grein um tiltak, sum Vaga Ríðingafelag fer at halda á Giljanesi. Tíverri kom greinin ov tíðliga í blaðið, og kann fólk tí fáa ta fatan, at talan er um tiltak, sum hildið verður hetta vikuskiftið.

So er ikki. Tiltakið hjá Vága Ríðingafelag verður hildið á Giljanesi leygardagin tann 7. mei.

## Nevnd til vetrarfriðing

**Gøta:** Á fundi í farnu viku í Gøtu bygdaráði var eitt av málunum um eina vetrarfriðing av bygdunum í kommununi.

Uppskot var komið úr teknisku nevnd um at veljast skuldi ein vetrarfriðingarnevnd, og var nevndin sjálv komin við uppskotum til limir í hesa nevnd.

Á fundinum samtykti bygdaráðið at taka undir við uppskotunum frá teknisku nevnd um at velja trý fólk í nevndina. Tey eru Jens Klæmint Jacobsen, Oluffa Joensen og Steintór Jacobsen.

Nevndin fer at skipa seg sjálv.

**sb.**

## Magni til Nashville

**Vestmanna:** Um stutta tíð fær kendi country-sangarin Magni Christiansen uppfylt ein av sínum dreymum. Í summar fer hann til Nashville í USA at taka upp enn eina fløgu.

Hann hevur higartil givið út fýra fløgur. Men nú ætlar hann sær so at taka enn eitt stig á tónleikaleið síni við at sleppa til sjálvan countrybýin Nashville.

Á gospeltúrinum umborð á Norrønu um vikuskiftið avdúkaði Magni ætlanir sínar. Hann segði tó, at henda nýggjasta fløgan fyrst kemur út í komandi ári.

Á bygdarráðsfundi í Vestmanna herfyri var eitt uppskot til viðgerð ein umsókn um stuðul til ferðina.

Bygdarráðið samtykti ikki at lata stuðul sum so, men heldur at keypa nøkur eintøk av fløguni, tá hon kemur út.

**sb.**

## Kuffamos í Klaksvík

**Ungdómstiltak:** Í døgunum 5. til 8. mai verður eitt serstakt tiltak í KFUM&K í Klaksvík við heitinum KuffaMos 2005.

Talan er um eitt ungdómstiltak, har teir vænta at fólk koma úr øllum landinum. Skráin er gjørd áhugaverd við sangi, tónleiki, drama, lovsangi og mongum øðrum tiltøkum.

Umframt møtir og ungdómsgudstænastu verður eisini skipað fyri fótbóltskapping í skúlanum á Fossanesi.

Fyri góðum ári síðani var skipað fyri eini landsungdómsstevnu í miniformat í Klaksvík. Nú er tíðin komin til eitt nýtt tiltak í hesum sambandi.

**sb.**